# Knút Gray 60 ár



Leygardagin 26. januar fyllir Knud William Gray í Hoyvík 60 ár.

Knút er føddur og uppvaksin í Havn, foreldrini vóru Anna, f. Petersen, og Harold Gray úr Onglandi, ið kom higar sum hermaður undir krígnum. Føroyski abbin var Knút skómakarin.

Eftir loknan barnaskúla og realskúla fór Knút til skips, og sjólívið bleiv hansara lívsstarv. Hann var nógv til skips við línuskipum. Síðan fór hann í læru á Tórshavnar Skipasmiðju og tók sveinaprógv sum maskinsmiður. Eftir hetta fór hann so á maskinmeistaraskúla og fekk útbúgving har.

Liðugur við maskinmeistaraskúlan fór hann út í verðina at sigla og gjørdist maskinchefur á teimum stóru tanga- og konteinarabátunum hjá Maersk. Hann hevur eisini arbeitt nógv í oljuvinnu umborð á supplyskipum, bæði í Afrika og Brasilia.

Inn ímillum hevur hann arbeitt okkurt tíðarskeið í landi sum t.d. á Tórshavnar Skipasmiðju, og í 2006 arbeiddi hann á vaktar- og bjargingartænastuni MRCC í Havn.

Knút er sera arbeiðssamur, pliktuppfyllandi, perfektionistiskur og ein góður handverkari. Í síni frítíð lesur hann nógv og er serliga áhugaður í søgu, umframt at hann er HB-ari, so tað forslær.

Knút er giftur Sólrun, f. Hansen, úr Saksun. Tey eiga døturnar Gunnvá og Anna. Abbabørnini, sum eru fýra í tali, gongur Knút høgt upp í og hann hjúklar um tey, tá hann er heima.

Føðingardagin er Knút burturstaddur.

## Dagurin

**26. januar. Polycarpos**, deyður umleið ár 155. Var biskupur í Smyrna og høgt mettur kirkjumaður í Lítluásia. 86 ára gamal verður hann píndur og tikin av døgum. Navnið hevur enntá í nýggjari tíð verið brúkt sum mansnavn í Føroyum, Karpus.

**27. januar. Chrysostomos**, deyður ár 407. Jóannes æt hann, men fekk navnið Chrysostomos (gullsmiður), av tí at hann var tiltikin at prædika. Var patriarkur í Konstantinopel, men fekk so nógvar fíggindar innan fyri kirkjuliðið, at hann fleiri ferðir mátti taka til rímingar, og á einari av ferðunum doyði hann, men varð seinni skírdur halgimenni.

**28. januar. Karlamagnus keisari,** deyður í 814. Eini 400 ár eftir deyða sín varð hann eftir uppskoti frá týska keisaranum Fríðriki Barbarossa skírdur halgimenni, men heitið varð ikki viðurkent av pávanum í Róm. Karlamagnus hevur annars verið høgt í metum, ikki minst í Føroyum. Karl er germanskt navn og merkir maður, og Magnus er latínskt og merkir stórur.

Sosialurin fyri 25 árum síðan:

# Ólavur Halgi rendi á Hælin




**Sosialurin 22. januar 1983:**

Blaðið skrivar um hendingina, tá vaktarskipið Ólavur Halgi rendi á Hælin í Hesti týskvøldið 18. januar í 1983. Fleiri skip komu til hjálpar: Lómur hjá Skipafelagnum, vaktarskipið Tjaldrið, sjóverjuskipið Fylla og onnur skip.

Tað eydnaðist at fáa skipið av aftur, og umleið sjey tímar eftir at skipið rendi á land, kom Tjaldrið við Ólavi Halga inn á Havnina. Ongin var á brúnni, tá Ólavur Halgi rendi á Hælin.



*Vaktarskipið Ólavur Halgi fekk stóran skaða. Botnurin er illa farin*



**Botnurin karvaður upp**

*Tað var onki at síggja á Ólavi Halga, tá Tjaldrið kom við honum á Havnina kl. 00,30 mikudagin.*

*Ikki fyrr enn fyrrapartin mikudagin, tá vaktar- og bjargingarskipið kom upp úr sjónum á vogninum hjá Tórshavnar Skipasmiðju, sást, hvussu illa botnurin var farin. Einir 15 metrar frammi á stevninum, á botninum har frammi og á bakborðssíðu umleið mittskips eru karvaðir upp.*

*Tað var ikki greitt, áðrenn blaðið fór í pressuna í gjár, hvat umvælingin fer at kosta og nær hon verður liðug.*

*Ongin sjógvur kom í sjálvt skipið. Bert í tangar og lastina. Á myndini taka menn av Fyllu móti endanum, tá Tjaldrið kom við Ólavi Halga á Havnina. Farmaskipið Lómur var fyrsta skipið hjá Ólavi Halga. Vit hava tosað við skiparan, Paula Larsen.*

**Síða 5**